Pisurøðan 1977:

Lond vera ikki bygd av teimum fáu,

men bert við at hækka um almenna undirvísingarstøðið, segði Heðin Samuelsen m.a. í pisurøðu síni



Tað vóru nógvir studentar at siggja á Vestanstevnu

Gott fundarfólk — góðu pisur — tað veri seg av gamla slagnum og av nýggja HFslagnum.

»Her standi eg. Eg kann ikki annað. Harrin hjálpi mær. Amen«. skal Luther hava sagt, tá hann 18. apríl í 1521 stóð fyri rikisdegnum í Worms og skuldi taka atur í seg, tey orð, sum ikki hóvaðu ávísum monnum.



Heðin Samuelsen, handilsskúlastjóri, helt pisurøðuna

Hesi orð kom eg athugsa um nakað skjótt aftaná at Sverri hevði biðið meg um at halda røðu fyri pisum undan einum vísdómsstovni, sum nú hevur 40 ár á baki.

Tí, hvønn førning hevur tú í grundini at lata frá tær?

Er tægan ikki í tómligari lagi?

Er nakað at bera fram fyri fólki, tá ein sjálvur bert hevur livsákoðanir, sum støðugt rilla. Tá ein onga fasta partapolitiska trúgv hevur. Tá ein ikki kann taka fult undir við nakrari samfelags politiskari hugsjón. Og tá lítið er til at taka av moralskum, etiskum o.l. reglum?

Til undanførslu fyri at ein hóast tað stendur her í dag, havi eg valt:

1. At tað er ein sannroynd, at flestu týðandi broytingar í hugsunarhátti, teknikki o.ø. stava frá, at bygt verður á samstarv við og á royndir hjá øðrum.

2. At tað kann verða til ugga hjá onkrum, sum livur í iva, at fáa at vita, at tað letur seg gera at liva lívið uttan fastar áskoðanir — og tó hava tað nøgunlunda gott við sjálvan seg, — at skilja soleiðis, at tú fært mest møguligt burtur úr teimum ymisku tættunum í livinum. Hesum livi hvørs djúpari meining ein hevur ringt við at skilja, um ein ikki hevur eina klettfasta guðstrúgv, men sum vit tó halda okkum vita so mikið um, at tað er prógvað, at universið ongan enda hevur, og at vit tískils ongantíð koma at kenna mørkini. Tað ber væl til at liva uttan fastar áskoðanir, sjálvt í eini tíð, har tað er líkt til, at tann einstaklingur ella tey hugtøk fáa bestu undirrøtku, sum best — til røttu tíð — duga at kyrra seg afturat tí røttu politisku áskoðanini, tí røttu samgonguni, teimum røttu frímúrarfeløgunum, teimum røttu trúðarbólkunum o.s.fr.

Hendan støðutakanin, nevniliga onga fasta støðu at hava til tær ymisku samfelagsáskoðaninar og samfelagsmálini, er tætt saman tvunnin við hugtøkini ábyrgd, skyldur og normar, t.v.s. medmenniskjuligar koyrireglur. Tí annars er vandi fyri, at ein endar í misskiltum frísinni, andligum forfalli ella kynismu — eitt nú í forkærleika fyri »surival of the fittest« — teoriini hjá Darwini t.v.s., at tey best egnaðu til hetta jarðarlívið — sæð yvir eitt longri tíðarskeið — troðka tey verri egnaðu burtur. Ella sum vanliga verdur tikið til av kynikarum í kappingarsamfelagnum (í skemti sjálvandi): »Teir stóru fiskarnir eta teir smáu« ella »tann klóki snýtir tann fávitskuta«.

Hesin andligi livihátturin er grundaður á arbeiðsprinsippið hjá Descartes »de omnibus dubitandum est«. T.v.s. at tú eigur at ivast í øllum. Og tað vil aftur siga, at tú í øllum málum leggur út við at ivast.Lutvíst fyri at fyribyrgja at tú kemur at trúgva okkurt skeivt og lutvíst fyri, at kunna styrkja trúnna á tað, sum tú heldur er á beinari leið.

Og ein sonn stremban eftir at liva eftir hesum livsprisippi krevur eisini tveir sálarligar eginleikar hjá tær sjálvum, nevniliga samljóð og viðkvæmi. Tyngdin í einum sjálvum má hvíla á einari samvitsku, sum er eins egna, og ikki bert eitt ekkó frá øðrum. Og ein má í yvirmát evna at taka ímóti ávirkanum, bæði kensluliga og andligt, á einum støði, sum liggur omanfyri tað dagliga vanbundna.

Tú kemur altso at liva í einum hugaheimi, har ongar moralskar reglur ella vanar forða tær í at hugsa frítt og at royna allar teir møguleikar, sum gevast. Tú tekur støðu frá máli til mál. Tú hevur ikki skyldu til at halda fast um tær áskoðanir um lívið og lutir av tilveruni, sum tú einaferð hevur vunnið. Tú verður tín egni dómari. Lívið verður ein stremban eftir skili og medvitan.

Á hendan hátt verður tú ikki minni reiðiligur sum medmenniskja. Tí helst manst tú hóast alt koma til **eina** serliga niðurstøðu, um tú ikki ynskir okkum aftur í frumskógin, og um tú vilt liva í samljóði við teg sjálva ella sjálvan, og hon er, at tú mást hava virðing fyri menniskjum og mannarættini, og at tú tí mást hav aábyrgdarkenslu fyri hesum somu, og at tú tí hevur skyldu til **ikki** at seta førningin av tær við vegin, men mást bera hann longur fram.

Tí mást tú, hóast alla tína vitan og alla tína vantrúgv fyri dagligum fyribrigdum, halda teg so nær til medmenniskjuligu koyrireglurnar — normarnir — at tú ikki tekur fótin undan øðrum, líkamikið hvørja áskoðan hesi hava.

Við hesum verður ikki sagt, at tær ikki er loyvt at bera frávíkjandi meiningar alment fram. Men tú hevur ikki loyvi til at trútta við tínum meiningum. Tú hevur ikki patent uppá ævinligar sannleikar.

Tann sum roynir at taka støðið undan føstu trúnni hjá fittu gomlu ommuni hevur ikki skilt hetta lívsprinsippið.

Tað sama er at siga um hann sum skjýtur lomviga.

Og um tann, sum í intelektuellari sjálvgleði, roynir at trýsta fremmandar hugsjónir og mentan niður yvir høvdið á fólki.

Og um politikaran, sum, aftaná sjálvur at hava fingið góða útbúgving og góð størv og bein í samfelagnum, ikki vil hava, at onnur fáa betri útbúgvingar- og livimøguleikar her á landi enn hann sjálvur.

Tað mentalt sunna menniskja strembar eftir at duga at siggja munin millum »útvikling« og framstig. Tað veit at objektivi veruleikin ikki er til. Tað veit, at tað eru ymsar fysiskar og kemiskar trongdir, kveikingar og rembingar, sum dríva menniskjuni fram. Tað veit, at egoisman og sjálvhevðanartrongdin hjá fólki situr djúpt — eisini í teimum, sum bjóða fagrar hugsjónir fram eitt nú pisurøðarum.

Tað lurtar væl eftir, men tekur sjálvt støðu til góðskuna.

Tað veit, at vit ikki kunnu liva av ediolegium. Og tað veit, at vit øll skulu vera til á hóskandi fysiskum og andligum støði.

Nú er tit pisur floygdar.

Onkur vil halda, at stúdents- og HF-prógv, uttan framhaldandi lestur, ikki er vert meira enn pappírið, tað er skrivað á.



Havnar Hornorkestur, við Hugh Watkins, sum leiðara, setti sín dám á hátíðarhaldið

Eg meti tað vera skeiva hugsan og kundi unt øðrum næmingabólkum, eitt nú vinnuskúlanæmingum, at fingið høvi til at seta seg inn í partar av tykkara verð.

Hinvegin meti eg eisini, at ein studentur, ella HFari, sum ikki hevur tikið lut í vinnilívinum og fyri alt tað eisini í gerandislívinum á bygd og bý, ikki hevur fortreytirnar fyri at nýta sín teoretiska kunnleika soleiðis, at hann finnur samljóðið í teimum ymisku lívsmálunum.

Tit hava í skúlanum nomið við bulin á nógvum samfelagsgreinum. Nú restar rótin, mergurin og krúnan í.

Eg veit, at tit hava havt lærarar,sum hava roynt at fest eygu tykkara á tann hugsunarhátt, sum eg beint nú havi umrøtt, og sum ikki er møguligt at greina gjøllari í røðu, sum helst ikki skal vera ov langrøkin. Sovorðnir lærarar vóru illa umtóktir í okkara skúladøgum. Vónandi er betur statt nú.

Vit hava í seinastuni hoyrt nógv um fuglin, sum verður avtoktur.

Tað er ein stóru spurningur, um ikki eisini framtíðar pisur verða riknar av rók. Og um so verður, verður tynnt á rókunum í erva, t.v.s. øvugt av tí sum hendir við fuglinum.

Í hvussu so er, stendur gamla akademikaraútbúgvingin fyri skotum í hesum døgum.

Funnist verður at, at studentarnir verða bornir á lógvunum frá vøggu og til teir hava lokið hægri lestur eini 25 ár eftir hetta. Teir koma alvitandi og oftani betrivitandi út frá lærustovnunum, fáa føst og feit størv — og so hoyrist ikki meira frá teimum — tó kansa um teir.

Eg haldi ikki, at vit eiga at syngja við í tí kórinum, sum hevur nakað ímóti, at onkur veit meira enn ein sjálvur um ávís evni. Hetta hevur sína orsøk í viðfeddum gávum, ídni og spesialisering.

Vit mugu eisini sleppa okkum undan hesum óvanunum at meta fólk eftir um tey eru bókliga væl at sær komin ella ikki. Lívið og evnini eru so fjølbroytt, at tað er beinleiðis ólogiskt at nýta hetta mát.

Men eg haldi, at vit hava loyvi at meta fólk, sum hava verið borin á lógvunum til eina góða útbúgving, eftir, um tey nýta sínar gávur og vitan til samfelagsgagn ella ikki.

Í Føroyum eru fleiri akademikarar, sum hava ábyrgdarkenslu fyri landi og fólki og leggja alla orku í tær arbeiðsuppgávur, teir eru settir at røkja.

Tað sum býður teimum flest ímóti, er hetta betrivitandi slagi, sum kann sveima víða í teorium av ymsikum slag, men ikki dugir at fylla eina postávísan rætt út og ikki dugir ella vil hava samband við gerandislívið og síni medmenniskju.

Víst hava vit brúk fyri vísindamonnum, og víst hava vit brúk fyri væl útbúnum fólki.

Men tað er líkasum at javnvágin haltar.

Ein samfelagsbólkur — serliga tey frá heimum, har tey sita væl í tí frammanundan, hava høvi til at fáa hægsta lærdóm. Nógv av teimum fáa størv seinni, har krøvini til vísindaliga viðgerð ikki eru serliga stór. Samfelagið — og helst eisini tey sjálvi — høvdu fingið meira gagn av, at tey heldur fingu eitt breiðari enn eitt hægri undirvísingarstøði, íroknað handligar royndir í gerandislívinum.

Aðrir samfelagsbólkar hava í okkara vælferðartíð eisini høvi til at læra. Men tað liggur líkasum í luftini, at ein handlig serútbúgving er nóg mikið fyri tey. Tey skulu ikki nema so nógv við tað, sum ikki beinleiðis hevur við framtíðarstarv teirra at gera.